Bjarni Djurholm við altjóða oljuserfrøðingar:

# Føroyar raðfesta olju-leitingina sera høgt



*Bjarni Djurholm setir stóru oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum*

*Mynd Jensk Vang*

**- og fara at gera alt fyri at skapa góðar og tryggar karmar rundan um komandi útbjóðingar á landgrunninum. Oljufeløg skulu vera vælkomin at luttaka í leitingini við Føroyar segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá hann setti oljuráðtevnuni í Norðurlandahúsinum**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Tað var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, sum setti oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum týsdagin. Hann segði tað var ein stórur heiður at kunna seta hesa spennandi og áhugaverdu ráðstevnu.

– Oljuleiting við Føroyar eru framvegis sera ung og traðkar enn sínar barnaskógvar. Og nettupp tí hevur tað so stóran týdning at kunna hava eitt forum, har serfrøðingar á økinum kunnu møtast og tosa um úrslitini av teirra kanningum og gransking.

Landsstýrismaðurin helt fyri, at føroyska undirgrundin er ein stór avbjóðing og nevndi her serstakliga basaltið. Nærum alt økið er dekkað við basalti, men kortini hevur leitingin víst, at tað ber til at gera kanningar undir basaltinum.

– Vit hava staðfest, at her ein ein virkin kolvetnisskipan. Her eru stórir strukturar at síggja. Reservoir frá ymsum tíðum eru í Føroyar Hetlands rennunij. Arbeiðsskráirnar fyri 2. Rundu eru ætlaðar at kunna koma longur við seismikki og øðrum kanningum fyri at fáa betri forstáilsi av tí, sum er undir basaltinum, soleiðis at tað seinni ber til at fara undir at bora her.

Bjarni Djurholm vísti eisini á broytingarnar sum eru gjørdar av nýggja landsstýrinum í sjálvandi oljufyrisitingini. Hesar koma ikki at hava nakra negativa ávirkan á framtíðar leitingina við Føroyar.

– Hóast vit hava lagt niður upprunaliga oljumálaráðið og seta á stovn eina nýggja oljufyrisiting hevur tað stóran týdning fyri meg sum oljumálaráðharra at kunna boða tykkum frá, at hesar broytingar á ongan hátt merkja, at vit raðfesta oljuleiting minni. Tvørturímóti ynskja vit við eini nýggjari útbjóðing at vísa umheiminum, at vit raðfestina leitingina sera høgt.

Langtíðarætlanin er at kunna staðfesta um her finnast kolvetni í rakstarverdugum nøgdum. Tað hevur stóran týdning, at oljuleitingin, sum byrjaði í 2001 kann halda fram og soleiðis at nýggj øki kunnu verða boðin út, og har ymisk arbeiðsmodell og jarðfrøðilig hugskot kunnu roynast – øll við tí eina endamálinum: at finna kolventi og fara undir framleiðslu.

2. útbjóðing er ein náturligur partur av hesi strategi. Hon verður helst latin upp í summar og loyvini latin móti endanum á árinum.

– Tað er vón mín, at hesir báðir dagar fara at kunna løna tykkum aftur, bæði á einum professionellum og einum menniskjaligum-privatum støði. Serliga fyri tykkum, sum vitja her fyri fyrstu ferð og eg vóni, at hetta bara er tann fyrsta av nógvum líknandi oljuráðstevnum.



*Nógv fólk vóru komin til ráðstevnuna, bæði føroyingar og útlendingar*

*Mynd Jens K Vang*

*Framhald av s. 15*

um nakað longur eysturi og harumframt í einum avmarkingarbrunni kring tað risastóra Clairfeltið.

### Hava áhuga

So felagið er rættiliga virkið á Atlantsmótinum og spurningurin er so, í hvønn mun felagið eisini fer at brúka orku til leiting við Føroyar. Sabine Rosemary Johnson sigur, at tey sum er ikki hava nakað leitiloyvi við Føroyar, men hon dylur ikki fyri, at tey ætla at liggja framvið til 2. rundu.

– Alt eftir hvussu úrslitið verður av teimum báðum brunnunum, sum vit fara at bora við markið í summar, so fara vit at taka støðu til í hvussu stóran mun vit skulu vera við í eini komandi føroyskari útbjóðing í 2005. Samantikið hevur tað tí stóran týdning fyri meg, hvat eg kann læra á hesi ráðstevnuni og síðani, hvat kemur burtur úr teimum báðum brunnunum við markið í summar.

Uppá fyrispurning um nøkur vánalig úrslit frá boringunum við markið í summar fara at gera, at ChevronTexaco kanska als ikki verður við í 2. útbjóðing við Føroyar sigur Sabine Rosemary Johnson, at felagið fer neyvanat hava eins stóran áhuga tá. –Um báðir hesir brunnar verða sera negativir, so fer tað at vera draga niðureftir hvat okkara virksemi her viðvíkur. Men eg veit, at onnur feløg hava aðrar metingar og meiningar um jarðfrøðina, so tað fari eg at lurta væl eftir.

Hon vísir á, at tey ymsu feløgini, sum arbeiða við Føroyaøkinum, hava ymsar áskoðanir og hugskot um jarðfrøðina her. Nógv er hent síðani boðið varð uppá fyrstu útbjóðing og tí heldur hon tað vera gott, at umboð fyri tey ymsu feløgini kunnu hoyra, hvat hvør er komin til og hvar leiðin gongur.

Vit spurdu Sabine Rosemary Johnson, hvussu tað ber til, at tveir brunnar, sum verða boraðir í bretskum øki, kunnu fáa so stóran týdning fyri, hvat ChevronTexaco ætlar sær á føroyska landgrunninum. Hon sigur, at tey við hesum brunnum ætla sær at testa nøkur jarðfrøðilig hugskot, og um hesi geva eitt positivt úrslit, so kunnu tey kanska eisini brúkast í øðrum økjum, t.d. í grannalagnum, nevniliga á føroyska landgrunninum. Hetta er m.a. orsøkin til, at hon er komin á ráðstevnuna – fyri eisini at fregnast um, hvat hini feløgini halda um jarðfrøðina. – Tað er ikki bara spurningurin um at vera í grannalagnum, men tað snýr seg eisini um at hava rætta jarðfrøðiliga modellið ella hugskot til at arbeiða út frá.

Sabine Rosemary Johnson er annars rættiliga bjartskygd um teir báðar brunnarnar við markið. Hon avdúkar fyri blaðnum, at kjansirnir fyri at finna olju og gass eru ein út av trimum, og hetta má sigast at vera rættiliga gott, tá hugsað verður um, hvussu ókent økið er og hvussu stóru váðin er.

– Hvussu kunnu tit vera so vís í, at møguleikin at finna olju er ein út av trimum?

– Tað er rætt, at hetta er gott. Vit hava góðar jarðfrøðingar og jarðalisfrøðingar, sum gera eitt sera gott arbeiði, og teir eru so eisini við á ráðstevnuni í Føroyum.

# ítróttur

Nr. 85 • mikudagur • 5. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sær svart út hjá Jákup

**Føroyski landsliðsleikarin í OB, Jákup á Borg, tykist hava lítlar møguleikar fyri at sleppa at royna seg á besta liðnum hjá danska felagnum**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Tað sær ikki út til, at Jákup á Borg fer at fáa møguleikan á besta liðnum hjá OB*

Leingi hevur við spenningi verið bíðað eftir, at Jákup á Borg fór at fáa møguleikan á besta liðnum hjá OB. Jákup hevur fleiri ferðir verið við í bruttohópinum upp undir dystir, men er síðani sílaður frá í seinastu løtu. Bert eina ferð hevur Jákup fingið sess á beinkinum, men tá kom hann ikki á vøllin.

### Gliðin úr hópinum aftur

Í kvøld skal OB spæla seinnu hálvfinaluna í steypakappingini móti Toda Jónsson og liðfeløgum hansara úr FC Keypmannahavn. Fyrra hálvfinalan, sum var leikt í danska høvuðsstaðnum, endaði við 3-1 sigri til donsku meistararnar.

Venjarin hjá OB, Troels Bech, hevur til dystin í kvøld tikið út ein hóp, ið telur 17 mans, men tíverri telist Jákup á Borg ikki millum hesar 17, og tað er tí nógv, sum bendir á, at tað neyvan fer at eydnast Jákupi at sleppa at royna seg á besta liðnum.

Seinasta leygardag leikti OB móti júst FC Keypmannahavn, og hóast fjónska liðið tá hevði fýra fastar mans annaðhvørt skaddar ella leikbannaðar, bleiv Jákup sílar frá, tá ið endaliga liðið bleiv sett, og hann noyddist tí enn einaferð at hyggja at frá áskoðaraplássunum. Henda dystin tapti OB heili 0-4, og seinastu vikurnar hevur tað ikki gingið serliga væl hjá liðnum hjá Jákupi.

### Jákup er skuffaður

Í telefonini úr Odense sigur Jákup á Borg, at hann er ikki sørt vónbrotin av, at hann ikki fær møguleikan. Hann sigur, at hann hevði vónað, at nú tað gekk so illa hjá OB, fór hann at fáa kjansin, men so tykist ikki at verða. Jákup sigur seg hava ringt við at skilja, hví Troels Bech ikki velur at geva nýggjum kreftum møguleikan, tá ið tað nú gongur so illa, men tað sær út til, at venjarin satsar upp á tær fastu kreftirnar.

Áðrenn leiðin gekk til Danmarkar, hevði venjarin hjá Jákupi í Føroyum, Heine Fernandez, ávarað hann um, at tað altíð er serliga trupult hjá leigaðum spælarum at fáa møguleikan, tí venjararnir í flestu førum velja at nýta teir leikarar, ið eru fast knýttir at felagnum. Jákup sigur, at sjálvur helt hann tað ganga væl hjá sær undir venjing, men tað tykist ikki, sum um venjarin hevur hug til at royna føroyska landsliðsleikaran.

### Heimferðin verður ikki framskundað

Í Føroyum hava leysasøgur gingið um, at føroyska felagið hjá Jákup, HB, hevur ætlanir um at fáa Jákup upp aftur, áðrenn leigusáttmálin gongur út. Tað hevur ikki gingið eftir vild hjá HB higartil í ár, og tí hevði tað óivað verið ein kærkomin styrkur, um Jákup á Borg kom heim aftur beinan vegin, men hetta avsannar hann sjálvur. Jákup sigur, at hann verður leigutíðina út, og at hann framvegis vil gera sítt til, at hann kann fáa møguleikan á besta liðnum hjá OB.

At summarið nærkast ger tað eisini hugaligari at verða í Danmark, sigur Jákup, og í hesum døgum hevur hann familjuvitjan úr Føroyum, og tað hjálpir upp á lagið í Odense.

### Er væl fyri

Hóast Jákup enn ikki hevur fingið nakra leiktíð í bestu donsku deildini, so metir hann sjálvur, at hann er væl fyri, og at honum ikki væntar dystarvenjing. Hvørja viku spælir hann dyst við antin eykaliðnum ella danmarkarseriuliðnum hjá OB, og tað er á rímuliga høgum støði. Sjálvur heldur Jákup, at eykaliðini hjá donsku superliga eru á hædd við fremstu liðini í Føroyum, meðan kappingin í danmarkarseriuni er á hædd við 2 deild her heima.

Jákup á Borg hevur vant fimm minst fimm ferðir um vikuna, síðani hann kom til Danmarkar, og tískil er formurin sera góður. Hann gleðir seg eisini ómetaliga nógv til landsdystin móti Hollandi um knappan mánað, og hann vónar, at tað fer at síggjast aftur, at hann nú hevur vant og leikt á grasi í tveir mánaðir.

# Hondbóltsfeløgini leita eftir venjarum

**Í hesum døgum arbeiða fleiri hondbóltsfeløg við at fáa endaligar avtalur í lag við teir persónar, ið skulu venja okkara fremstu hondbóltslið komandi kappingarár**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru ikki nógv feløg, ið enn hava fingið venjaraspurning til komandi kappingarár upp á pláss. Sum vit hava skrivað her í blaðnum áður, so hava føroyameistararnir úr Kyndli gjørt avtalu við gullvenjaraparið, Kári Nielsen og Birgir Hansen, meðan tey flestu av hinum liðunum enn ikki hava fingið avgreitt venjaraspurningin.

### Gerster heldur fram

Í Hoyvík er greitt, at danin Henrik Gerster heldur fram sum venjari. Rúni Djurhuus, formaður í H71, sigur, at felagið gjørdi ein tvey ára sáttmála við stóra danan, so har er alt upp á pláss. Spurdur um hvussu tað sær út við fólki, sigur Rúni Djurhuus, at allir leikararnir fara at halda fram í felagnum, og at tað í løtuni eisini verður arbeitt við at fáa styrk aðrastaðnis frá.

Neistin hevði nýligani aðalfund, men har kom einki fram um, hvør ið skal venja lið felagsins komandi ár. Tað er tó okkurt, sum bendir á, at tað kanska verður Andreas F. Hansen, ið kemur at standa á odda fyri monnunum hjá Neistanum. Andreas er í løtuni búsitandi í Fraklandi, men flytur heim aftur á klettarnar í summar. Hann hevur áður verið venjari hjá Neistanum við góðum úrsliti.

### Strandingar leita uttanlands

Á Strondum eru teir nær við at hava avgreitt venjaraspurningin. Formaðurin í StÍF, Andrass Danielsen, sigur, at teir arbeiða við einum útlendskum venjara, og tað kemur væntandi upp á pláss ein av fyrstu døgunum. Tað verður tó ikki venjarin í fjør, Marian, ið kemur at halda fram, hóast hann allarhelst verður verandi á Strondum. Andrass Danielsen sigur, at til komandi kappingarár er ætlanin, at venjarin bert skal verða venjari og ikki leikandi venjari. Formaðurin í StÍF sigur, at komandi kappingarár verður liðið ikki styrkt við útlendskum leikarum, tí hann metir, at felagið hevur so mikið gott tilfar sjálvt, at tørvur er ikki á at fara út um landoddarnar eftir leikarum. Andrass Danielsen sigur, at teir leitaðu eisini í Danmark eftir venjara, men tað vísti seg, at donsku venjararnir vóru tvífalt so dýrir sum eystureuropeisku venjararnir.

Í Vestmanna høvdu tey aðalfund mánakvøldið. Fráfarandi formaðurin í VÍF, Jógvan Sigurd Poulsen, letur væl at farna árið, og hann sigur seg verða væl nøgdan, so leingi tað ikki eru reyð tøl á botnlinjuni. VÍF er um at hava avgreitt venjaraspurningin, og Jógvan Sigurd Poulsen sigur, at málið verður allarhelst avgreitt í hesi vikuni. Nýggi venjarin hjá VÍF verður óivað føroyingur, tí tað er ov ósikkurt og dýrt við útlendskum venjara, sigur fráfarandi formaðurin í VÍF.

Okkum eydnaðist ikki at fáa fatur á umboðum fyri KÍF, men hetta venda vit aftur til seinni.